# Dómarayvirlit

**Formuladeildin:**

| | |
|---|---|
| EB/Streymur – HB | Jens Petur Brattalíð |
| AB – NSÍ | Ransin Djurhuus |
| GÍ – KÍ | Lars Müller |
| Skála – B36 | Petur Reinert |
| B71 – VB/Sumba | Eiler Rasmussen |

**1. deild menn:**

| | |
|---|---|
| ÍF – SÍ | Jón Kári í Brekkuni |
| LÍF – B68 | Bárður Mortensen |
| HB – KÍ | Vinjard Dam |
| FSV 04 – B36 | Eugen Voda |
| TB – NSÍ | Páll Augustinussen |

**1. deild kvinnur:**

| | |
|---|---|
| AB – NSÍ | Magnus í Króki |
| EB/Streymur – GÍ | Marner Olsen |

**2. deild menn:**

| | |
|---|---|
| MB – EB/Streymur | FS Vágar 04 |
| GÍ – FSV 04 | Alex Troleis |
| Skála – KÍ | Jóhan B. Dahl-Olsen |
| ÍF – Fram | Andreas Josephsen |
| B68 – B36 | Jákup Baldvinson |

# Steypafinalan strikað um vikuskiftið

**Bæði í EB/Streymi og HB verður sagt, at í innanhýsis uppgerðini um vikuskiftið verða eingi atlit tikin í sambandi við steypafinaluna mikukvøldið**

EB/STREYMUR-HB
*Jákup Mørk*

Sunnudagin hittast EB/Streymur og HB í Streymnesi. Mikukvøldið hittast somu feløg í Gundadali. Sunnudagin standa stig upp á spæl. Mikukvøldið fer tað at snúgva seg um Løgmanssteypið.

Í báðum legum verður undirstrikað, at upp undir vikuskiftið verður finalan goymd, men sjálvandi ikki gloymd.

- Síðst taptu vit 4-2 á nýggja heimavøllinum móti B71. Í Europa Cup og í Vági var spælið betri, enn tað hevur verið fyrr í ár. Lyklaspælarar, sum kanska ikki hava verið heilt á toppinum, hava aftur víst sínar dygdir, og vit hava gottmót, sigur liðformaðurin og verjuálitið í EB/Streymi, Egil á Bø.

Hvussu við HB?

- Teir hølvaðu okkum av í Gundadali. Týskvøldið móti AB sást, at teir hava eitt stak gott lið, tá ið teir fáa frið og pláss at spæla. Vit mugu spæla okkara spæl og arbeiða hart fyri, at teir ikki sleppa at spæla teirra spæl, sigur Egil á Bø.

HB venjarin Albert Ellefsen er væl nøgdur við gongdina hesar seinastu ferðirnar.

- Motivatiónin hevur nógv at siga. Móti AB tímdu allir í senn. Tað hevur eisini nógv at siga bæði á og uttanfyri vøllin, at vit hava fingið Andrew av Fløtum aftur. Sum heild er sjálvsálitið í løtuni stórt á liðnum, og tá ið tingini eydnast, verður tað so nógv lættari.

Hugsa tit framvegis um FM heitið?

- Møguleikin er har. Men vit fokusera upp á næstu avbjóðingina og ikki meiri enn tað. Nú fara vit at spæla tvær ferðir ímóti EB/Streymi. Dysturin millum B36 og B71 var gott dømi um, hvussu smáir lutir tað eru, sum gera av, hvussu ein dystur kann taka seg upp. Tað ræður um at vera klárur og at taka av, tá ið møguleikin er har, og tað eru vit, sigur Albert Ellefsen.

Jákup á Borg er farin at venja aftur eftir skaðasteðg. Hann verður ikki við sunnudagin, men í HB verður vónað, at hann verður tøkur mikukvøldið.



*Størsti spenningurin í Formuladeildini um vikuskiftið verður í toppdystinum í Streymnesi, har HB vitjar hjá EB/Streymi. Hetta er eisini aðalroyndin undan steypafinaluni, har somu lið hittast.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Danskt krút skal standa sína roynd

**Bæði í GÍ og KÍ verður ásannað, at tað er neyðugt at fáa størri úrtøku, enn tað higartil hevur eydnast at fingið**

GÍ-KÍ
*Jákup Mørk*

Bæði GÍ og KÍ hava í summarsteðginum verið í Danmark og leitað eftir nýggjum álopsspælarum. Í Gøtu er Christian Lundberg komin afturat. Hann kenna klaksvíkingar væl, tí Lundberg spældi fyri einum árið síðani við KÍ.

- Christian Lundberg er fínur. Hann veit, hvussu hann skal bera seg at í brotsteiginum hjá mótstøðuliðnum, og hann dugir eisini at vísa okkara spælarum, hvussu teir eiga at arbeiða og bera seg at sum rættir álopsspælarar.

Hetta sigur GÍ liðformaðurin Sámal Joensen. Í Runavík noyddist hann av vøllinum longu í 1. hálvleiki. Sámal vónar tó, at hann verður førur fyri at spæla móti KÍ sunnudagin. Gøtumenn vóru annars illa nøgdir við gongdina í Runavík síðsta sunnudag.

- Vit høvdu ikki marginalirnar við okkum. Eitt var, at vit ikki skoraðu upp á møguleikarnar. Annað var, at vit kendu okkum rudduliga burturdømdar í sambandi við brotsspørk. Eg vænti ein tættan dyst ímóti KÍ, og vit fara at arbeiða hart fyri í hvussu so er at vinna fjórða plássið, sigur Sámal Joensen.

Í Klaksvík eru teir væl nøgdir við Denni Conteh, sum er skilagóður. Framvegis restar tó at skjóta fyrsta málið í landskappingini. Hjá KÍ er hinvegin ivamál, um toppskjúttin Paul Clapson verður við. Hann koykti fótin undir venjing hóskvøldið.

- Trupulleikin hjá okkum hevur verið, at vit hava fingið ov lítið burturúr málmøguleikunum. Tíbetur hevur tað ikki kostað stig, at vit hava søplað har frammi, tí verjan hevur verið púra tøtt. Men tað er spell, um eintakt verjumistak skal kosta stig, tí vit ikki sjálvir skjóta mál, sigur KÍ venjarin Eyðun Klakstein.

# Sárini slikkað á Sandi

**Bæði B71 og VB/Sumba vóru væl við, men fingu einki burturúr síðsta umfarinum**

B71-VB/SUMBA
*Jákup Mørk*

Felags fyri sandoyingar og samansetta suðuroyarliðið var í 17. umfari, at tey vóru heilt væl við, men tá ið tað var liðugt, høvdu tey einki fingið burturúr.

Sandoyingar misnýttu stórar møguleikar í Gundadali, meðan støðan framvegis var málleysur javnleikur. VB/Sumba var á odda, inntil tað restaði lítil løta, og í yvirtíðini mistu teir alt ímóti EB/Streymi.

- Vit kunnu ugga okkum við, at vit leikliga vóru væl við. Við størri nærlagni framman fyri málinum kundu vit havt rokkið í minsta lagi javnleiki. Men fyri fimtu ferð í ár fóru vit av vøllinum uttan at hava skorað. Tó eru vit við 28 málum millum mest skorandi liðið, verður staðfest í B71.

Í Vági royna tey at fokusera upp á stóru avbjóðingina og harvið at leggja aftur um bak óhepnu gongdina, sum kom í, tá ið teir høvdu mist á stokkinum á heimavølli síðsta sunnudag.

- Stigatalvan vísir, at støðan er hættislig hjá okkum, men vit fara at stríðast alt tað, sum vit eru mentir fyri at sleppa upp um niðurflytingar strikuna, siga tey í VB/Sumba.

# Størsti spenningurin

Størsti spenningurin undan 18. umfari í Formuladeildini er helst um dystin í Streymnesi, har HB vitjar hjá EB/Streymi. Úrslitini undanfarnu árini vísa, at áskoðararnir kunnu vænta ein javnan og spennandi dyst. Tá dystirnir í millum hesi feløgini verða leiktir í Sundalagnum endar ofta við fáum málum og javnleiki, og tí kunnu áskoðararnir vænta ein javnan og spennandi dyst. Tað er tó komið fyri, at nógv mál koma. M.a. vann EB/Streymur heili 4-0 fyri tveimum árum síðani á Mølini á Eiði. Annars vísa úrslitini síðstu árini eisini, at dystirnir millum Skála og B36 ofta eru sera javnir, meðan KÍ hevur havt eitt rættiliga gott tak á GÍ í Sarpugerði. Leggjast kann afturat, at B71 síðstu 10 árini ongantíð hevur vunnið á heimavølli ímóti VB/Sumba. Í teimum fýra dystunum, sum liðini hava leikt, hevur VB/Sumba nevniliga vunnið teir allar.

| | 07 | '06 |
|---|---|---|
| EB/S-HB | - | 1-1 |
| AB-NSÍ | - | - |
| GÍ-KÍ | - | 1-4 |
| Skála-B36 | - | 1-0 |
| B71-VB/S | - | - |